# Tekniskur umsjónarmaður (Inspektør)

Grundað á, at virksemið felagsins verður økt, verður hervið søkt eftir einum maskinmeistara.

**Arbeiðsuppgávur:**
Arbeiðsplássið er fyrstu tíðina, at virka sum maskinmaður umborð á einum av skipum okkara, síðani sum tekniskur umsjónarmaður (inspektør), út frá skrivstovuni í Hósvík.

**Starvið sum tekniskur umsjónarmaður (inspektør), inniber:**
- At taka sær av teknisku/rakstraligu/viðlíkahaldsligu viðurskiftunum hjá skipum felagsins.
- At gera fíggjarætlanir og fylgja teimum upp.
- At gera tekniskar útrokningar viðvíkjandi skipunum.
- Umsjón og eftirlit av okkara skipum, herundir at gera fyrireikingar til dokkingar.
- Viðlíkahald av og at menna skipsteknisku forritini.
- Ymsar fyrifallandi uppgávur - herundir neyðug ferðing í samband við arbeiðið.

**Førleikakrøv**
Útbúgving sum maskinmeistari og praktiskar royndir í sigling.
Kunnleika til arbeiði í reiðaríið, galdandi reglur og lógir, viðvíkjandi skipstekniskum og fyrisitingarligum viðurskiftum.
Góðan kunnleika til nýtslu av nútímans arbeiðsamboðum eins og kunningartøkni.
Førleika at samskifta munnligt og skrivligt á føroyskum og enskum.
Verða ábyrgdarfullur og røkin. Góð samstarvsevni.

**Løn og setanartreytir**
Eftir avtalu.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Gunnbjørn Joensen, stjóra, tlf. 422503, fartel, 585801 ella teldupost: gunnbjor@thor.fo.

**Umsóknin** saman við avritum av prógvum og møguligum ummælum skal sendast til

**P/F THOR**
Bryggjan 5
420 Hósvík

Umsóknin skal verða okkum í hendi, áðrenn 10. mars 2005.

*P/F THOR, er eitt felag, sum eigur og rekur skip í olju-vinnuni, fiskivinnuni, og hevur annað virksemi í hesum sambandi, víst verður til heimasíðu okkara www.Thor.fo.*




# Skúlavígsla í Kvívík

Í sambandi við at nýggi parturin av Kvívíkar skúla verður vígdur leygardagin 12. mars 2005, kl. 16.00, verður móttøka fyri sóknarfólki og øllum áhugaðum.

**Kvívíkar skúlastýri**

# Verkkapping fyri Stórband

Tórshavnar Stór Band vil hervið lýsa við fyrstu føroysku verk-kappingini fyri stórband. Krøvini eru hesi:

1. Verkini skulu vera smíðaði og útsett fyri fult stór band av tónasmiðinum sjálvum. Klaver, bass, trummusett, slagverk, guitar, fýra trompetir, fýra trombonir, fimm saxofonir (tvær alt, tvær tenor og eina baryton).
2. Verkini mugu ikki áður hava verið framførd.
3. Verkini skulu vera minimum 5 minuttir til longdar.
4. Verkini skulu vera fyrireikarunum í hendi seinast 1. mai.

Fyrsti vinningur er áljóðandi 30.000 kr. Konsert verður við innkomnum verkum, har eisini vinnarin verður kosin. Nærri fæst at vita við at venda sær til Ólavur Olsen, leiðara av Tórshavnar Stór Band, á tlf. 221114 ella á postadressu olavur@hotmail.com

Havnar
SJÚKRAKASSI

# Umboðsráðsval

## verður hósdagin 3. mars 2005 frá kl.9.00 til kl. 18.00

Hesi valevnir eru uppstillaði til umboðsráðið hósdagin 3. mars 2005.

Teir persónar sum eru merktir við " *) " eru umboðsráðslimir, sum hava sitið farna skeiðið.

**Tórshavnar valdømi:**
Birgit Hansen, Heygsvegur 1, Tórshavn *)
Jenny Hansen, Dalakrókur 19, Tórshavn
Juliette Hansen, Varðabyrgi 34, Tórshavn
Ingrid S. Henriksen, Gundadalsvegur 53, Tórshavn *)
Heðin Mortensen, Hoyvíksvegur 22A, Tórshavn *)
Karin Maria Nielsen, Brattabrekka 27, Tórshavn *)

**Nólsoyar valdømi:**
Suni Hansen Nólsoy *)
Torbjørg Jacobsen,Nólsoy

**Havnar Sjúkrakassi**

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# CAMBRIDGE EXAMINATIONS

Tilmeldingarfreistin til próvtøkurnar í mai/juni 2005 er úti **18.3.2005 kl. 12.00.**

**Tilmeldingargjald:**
First Certificate in English 800,00 kr.
Certificate in Advanced English 900,00 kr.
Certificate of Proficiency 1.000,00 kr.

**Tilmeldingargjaldið skal gjaldast kontant við tilmelding sum fer fram á**

Setursskrivstovuni kl. 9.00-16.00 vanligar dagar og til kl. 12.00 fríggjadagin 18.3.2005.

**Setursskrivstovan**
J. C. Svabosgøta 14
tlf. 35 25 00






**Ellis- & avlamisheimið í Vágum**

# Frítíðaravloysarar

Søkt verður eftir sjúkrasystrum, sjúkrahjálparum, heilsuassistentum og heilsuhjálparum umframt ymiskum hjálparfólki, ergo- og fysioterapeuti.

Skrivlig umsókn við neyðugum prógvum v.m. verður at senda til heimið áðrenn 27. mars 2005. Nærri um avloysarastørvini fæst at vita við at venda sær til leiðaran.

# Høll og hølir til leigu á Hjalla

Stór ljós og góð hølir ti lleigu á Hjalla. Kunnu nýtast til ymisk endamál, minni ella størri eindir. So sum handilshølir, goymsluhølir, skrivstovuhølir, verkstað ella annað.

Hevur tú áhuga, ella vilt tú bara vita meira, ert tú vælkomin at ringja til

**Tlf. 217300**